Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Skapandi fyrireikingarbreyt á Glasi

Spurningar:

1. Við hvørjum treytum hevur landsstýrismaðurin góðkent skapandi fyrireikingarbreytina á Glasi?
2. Er 18 ára aldursmarkið, ið treytar upptøku á fyrireikingarbreyt, broytt fyri alla fyrireikingarbreytina, ella er hetta bara galdandi fyri skapandi breytina?
3. Er námsætlanin fyri handaliga partin nýggj ella partur av verandi útbúgvingarskipan og um ja, hvørjari?
4. Er útbúgvingin góðkend sum atgongd til víðari lestur so sum design, námsfrøði og læraraútbúgving?
5. Nær er søkt um at fáa útbúgvingina og nær er útbúgvingin góðkend av landsstýrismanninum?
6. Er meting gjørd av tørvinum á nýggju útbúgvingini?
7. Er ætlan um at endurskoða og dagføra breytaskipanina?
8. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at skipa fleiri nýggjar útbúgvingar á øðrum miðnámsskúlum?

Viðmerkingar:
Nú næmingar kundu søkja inn á miðnám, lýsti Glasir við nýggjari 3 ára miðnámsútbúgving. Hon bleiv nevnd skapandi fyrireikingarbreyt. Lýst varð við, at hetta er ein 3 ára útbúgving, har næmingurin fær møguleika at arbeiða bókligt og handaligt innan eitt nú design.

Upptøkutreytirnar eru tær somu sum til miðnám annars – 9. ella 10. flokspr ógv.
Higartil hava upptøkutreytirnar til fyrireikingarbreytina verið, at næmingurin er fyltur 18 ár í seinasta lagi 31. desember tað árið, ið næmingurin byrjar útbúgvingina.

Verandi miðnámsskipan hevur hesar breytir: hugbreyt, náttúrubreyt, fyrireikingarbreyt, búskaparbreyt, tilfeingisbreyt og tøknibreyt. Nú kemur so skapandi fyrireikingarbreytin.

Spurningurin er, hvussu nógvar breytir, ið tørvur er á og um fleiri breytir fjøltátta útbúgvingarskipanina ella spjaða næmingatilgongdina. Eisini er spurningurin, um verandi breytaskipan ikki hevur tørv á eini endurskoðan og dagføring. Skipanin er stórt sæð óbroytt síðan byrjan í 2013.

Hesin fyrispurningur verður settur fyri at fáa upplýst um ætlanirnar við nýggjum útbúgvingum á miðnámi.

Á Løgtingi, 25. mars 2022

Eyðgunn Samuelsen